Dagf. 27. januar 2022
HMR J.nr. 22/01279-4

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-113/2021 eftir § 52a í tingskipanini um prísáseting hjá Landssjúkrahúsinum, frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu

Fyrispurningarnir eru soljóðandi:

1. Hevur Landssjúkrahúsið endurskoðað prísásetingina til innan- og uttanhýsis keyparar so sum Klaksvíkar sjúkrahús, Suðuroyar sjúkrahús og Heilsutrygd?
2. Um ja, nær kemur prísásetingin í gildi?
3. Á hvørjum støði verður prísásetingin í mun til verandi áseting?

Svar:

Til spurning 1

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum heitti 23. oktober 2020 á SPEKT um at gera eina gjøgnumgongd av goymsluni á Landssjúkrahúsinum. Frágreiðingin varð handað Landssjúkrahúsinum í september 2021.

Sambært Landssjúkrahúsinum eru tey í holt við at gjøgnumganga tey tilmæli, sum frágreiðingin frá grannskoðanarfyritøkuni SPEKT kom við í september 2021, m.a. at endurskoða prísásetingina, tá keypt verður frá goymsluni á Landssjúkrahúsinum. Enn er Landssjúkrahúsið ikki komið á mál við øllum arbeiðinum hesum viðvíkjandi.

Eitt av tilmælunum er at fáa skjalfest veruliga kostnaðin av at reka goymsluna, so hetta kann takast við í metingina av einum nýggjum prískspolitikki. Landssjúkrahúsið er ikki liðugt við hesa meting enn.

Til spurning 2

Landssjúkrahúsið er enn ikki komið á mál við at viðgera frágreiðingina hjá SPEKT. Í hesum sambandi eru fleiri spurningar ið skulu viðgerast. Væntandi verður greiningararbeiðið klárt stutt eftir summarsteðgin, so endalig støða kann takast tíðliga í heyst.

Til spurning 3

Enn ber ikki til at siga nakað um á hvørjum støði prísásetingin verður.

Heilsumálaráðið, 27. januar 2022

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður